Minningarorð um Daniel Jacob Berg í Nesi, Hvalba

Mær var dáttliga við henda morgunin 9. januar at frætta deyðsboðini av einum av mínum bestu vinum frá barnaárunum: Danjal Jacob á Breyt er deyður.

Hann fór, sum hann gekk, henda frostmorgunin 74 ára gamal — hevði verið smá handilsørindi, og var á heimvegnum aftur stokkin inn á gólvið hjá vinfólki at ynskja gott nýggjár. Tað var alt, hann hevði sett seg niður á bonkarendan, tá rætti deyðin út sína køldu hond og tók hann burtur frá einsamallan úr vinaskra, soleiðis sum deyðans vani oftast er — ein og ein tekur hann okkum.

Við Danjal Jacobi á Breyt er ein sterkur maður farin — hann spardi seg ikki, har hann stóð millum manna á landi og sjógvi.

Harðligur kundi hann vera viðhvørt og rópa hart, tá ið ikki gekst eftir hansara høvdi, men tann, sum kendi Danjal Jacob og visti honum álit, fekk at síggja, at trúgvari og hollari vin átti tú ikki. Hann var ein álitismaður.

Í 1930 fór hann til skips fjúrtan ára gamal, og sjólívið varð hansara til seinastu stund. Eisini á stuttleikatúrinum við »Johannu T.G. 326« til Keypmannahavnar seinasta summar vísti Danjal Jacob, hvat tað er at vera sjómaður, tá ið á leikar.

Í tríati árunum hevði Danjal Jacob ikki verið tey mongu árini við slupp, fyrr enn hann var millum bestu fiskimenn við snørinum, og »fiskikongarnir« vóru skjótir eftir honum. Hann lærdi til stýrimann fyrstu krígsárini saman við øðrum góðum monnum, og teirra millum var Hans Pauli Johannesen. Teir gjørdust vinmenn og starvsbrøður uá sjónum ein stóran part av lívinum. Í drúgt áramál var hann stýrimaður við Hans Paula og loysti hann av sum skipara viðhvørt. Teir vóru tvær alin av sama vadmali. Fiskur og veiða, veiða og fiskur — tað var teirra, tí tað var tað, ið landinum tørvaði.

Saman við bygdarmonnum sínum í Hvalbiar sókn keypti hann trolaran »Drátt«, sum Niels Pauli Nónstein og hann førdu øll árini, teir høvdu trolaran.

Farin um tey 60 árini segði hann seg vera farnan í land. Men har steðgaði hann ikki. Tá fór hann at føra útróðrarbátin »Glyvraberg« bæði til línu og trol í fleiri ár.

Tey seinastu árini hevur hann leitt tað fiskaarbeiðið, sum hevur verið í Agnavík í samarbeiði við Flakavirkið á Tvøroyri.

Danjal Jacob var góður við sína heimbygd Hvalba og bar serligan tokka til Nes sum part av sóknini. Hann hevur í mong ár sitið sum bygdaráðsformaður, og nú, hann andaðist, sat hann framvegis sum limur í sóknarstýrinum.

Sjálvt um Danjal Jacob var ein av teimum, sum mistu av sínum undir krígnum — einasti bróðir hansara fór av krígsávum longu í 1940 — so hevur hann balist á sjónum alt lívið. Mangan lá eisini honum vátt undir fótum, sum tann dagin, teir løgu út millum oyggjar við installeringinum »Bláfoss«, tá ið hann brann á av eystri, og teir fingu andstreym til lands. Tað var ein ótespilig sigling við ættini í streymin í kapp við deyðan um Suðuroyarfjør, til Lundanevnið lívdi.

»Mangan havi eg brattan farið . . . « syngur skaldið, og tað kunnu nógvir av okkara sjómonnum syngja við um bæði við heimlands strendur og burturi við onnur lond í myrkri og ísi og ódnarveðri. Ein av teimum daprastu stundunum av hesum slag, sum Danjal Jacob helt seg hava verið við til, var tann náttin, teir við »Fiskanes« ígjøgnum ís og í myrkri sjálvir í størsta lívsvanda hildu fram á Kappanum 29. januar 1959 at leita eftir tí neyðstadda danska ferða- og farmaskipinum hjá kongaliga grønlendska handlinum »Hans Hedtoft« við vón um at koma tí til hjálpar. Men har var til seinast einki at gera, uttan at royna at bjarga egnum skipi.

Men nú henda morgunin 9. januar 1991 var eingin ódn, einki myrkur, eingin ýlandi ísur — nei, hann karraði av eystri við einum sindri av svartakálki á vegnum. Vattleysur og klútaleysur við einum mjólkarpakka undir hondini uttan at varnast nakran vanda kemur hann — henda kempa, sum eitt langt lív hevur barst og strítt móti deyðans ódn — fót fyri fót tolisliga úr svartakálkinum inn á gáttina hjá vinfólki, setir seg í náðum niður á bonkarendan og í somu løtu gevur upp ond. So stillisliga legði hann at deyðans strond.

Ja, deyðin er ikki lættur at rokna út. —

Eftir situr konan, Anna, sum hevur verið honum ein ómetaliga góð kona í øllum lívsins viðurskiftum. Tey hava synirnar Óla og Esmar, sum báðir eru lærarar í Hvalba.

Í hesum brádliga missi, sakni og sorg tykkara havi eg størstu samkenslu.

Við Danjal Jacob á Breyt fór aftur ein av tí gamla slagnum. Tað er, sum eg hoyri hann siga: hvør stígur nú í okkara spor og hvussu stíga tykur, landsmenn?

Eg beri tær, vinur, mína bestu tøkk fyri trúfast og gott vinarlag.

Friður veri við minninum um Danjal Jacob á Breyt!

Johs.

sosialurin — altíð fyrstur við tí síðsta!

Gerist haldarar NÚ — og fáið alt hetta:



Einsamøll — eingi tíðindi

— 5 bløð um vikuna í 3 mánaðir fyri bert 195,-

Haldið so: tíðindablaðið sosialin

og fáið henda góða vinin — Føroya mest lisna og mest endurgivna blað

5 ferðir um vikuna

fyri bert ½ sølupris!

Haldið blaðið

- við teimum fjølbroyttu tíðindunum
- við besta trúvirðinum
- sum birtir upp undir skilagott og mennandi kjak
- sum er blað fólksins

tíðindablaðið sosialurin sjálvandi

sosialurin - sosialurin - sosialurin - sosialurin - sosialurin - sosialurin - sosialurin

Ja! Eg gerist haldari av Tíðindablaðnum Sosialinum og fái blaðið **5 ferðir um vikuna.**

Haldaragjaldið er kr. **195**,- fyri ársfj.
Haldarar uttanlands gjalda kr. **230**,-/ársfj.
Goldið verður ongantíð fyri fleiri bløð enn tey, ið eru eftir at koma í einum ársfjórðingi.

Navn: ____________

Bústaður: ____________

Bygd/býur: ____________

Kannað postverkinum

Ókeypis Sosialurin rindar postgjaldið

64

tíðindablaðið sosialurin

Box 76
110 Tórshavn